2. deild: LÍF – ÍF 3-0 (2-0)

LÍF vann á grannunum

Eingin ivi var um, hvør rætti sigursharrin var í grannauppgerðini millum LÍF og ÍF. Leirvíkingar høvdu fult tamarhald á dystinum og vunnu ein greiðan 3-0 sigur

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

LÍF tapti síðsta vikuskiftið 3-0 móti FS Vágum, men hesuferð var tað 3-0 til leirvíkingar, tá ÍF var á vitjan. Fuglfirðingar høvdu óivað sjálvsálitið í lagi undan dystinum eftir 8-1 sigurin á KÍ seinasta vikuskiftið, men útiliðið kom skjótt niðuraftur á jørðina.

"Høj at flyve, dybt at falde" sigur orðatakið, og tað kunnu fuglfirðingar taka undir við.

LÍF legði hart út og longu eftir umleið 90 sekund hevði heimaliðið bóltin í netinum. Tað var Bárður Heinason, sum fekk fótin á bóltin inni í málteiginum eftir hornaspark.

Hetta málið tók luftina úr ballónini hjá ÍF, sum ongantíð kom fyri seg eftir at hava fingið hendan frammaná longu í øðrum minutti.

Beint undan hálvleikssteðginum fekk LÍF enn eitt mál. Hesuferð var tað Johnhard Høgnesen, sum var málskjútti. Ein langur bóltur varð sendur afturum ÍF verjuna. Jonhard eltir bóltin saman við einum verjuleikara, og málverjin kemur út ímóti. Staddur beint uttanfyri brotsteigin fær Jonhard fótin á bóltin, sum fer í netið.

2-0 var støðan við steðgin, og øll vóru samd um, at hetta var fult uppiborið.

sum teir fingu seinasta vikuskiftið.

Móti endanum av dystinum fekk LÍF enn eitt mál. Petur Sjúrðarberg fór ígjøgnum í høgru, og hann fær eina sending av miðvøllinum, samstundis sum verjan hjá ÍF roynir at fanga hann í rangstøðu, men tað eydnast ikki. Petur er so leysur við málverjanum, og hann lyfti uppum til endaliga úrslitið 3-0.

ÍF hevði sum heild lítið av bjóða uppá og líktist als ikki einum liði, sum hevur ætlanir um at flyta upp í ár. ÍF hevði bara eitt skot á málið hjá LÍF, og bara eitt hornaspark fall í teirra lut. LÍF-leikararnir vóru hinvegin nógv svangari og grammir í nærdystum.

LÍF reisti seg sostatt aftur eftir 3-0 tapið á heimavølli móti FS Vágum seinasta vikuskiftið. Hetta gevur teimum óivað mót til at vera við í oddastríðnum í ár.

Næsta vikuskiftið skal ÍF spæla ímóti B36 í Fuglafirði, og LÍF fer til Klaksvíkar.

LÍF – ÍF 3-0 (2-0)
1-0: Bárður Heinason
2-0: Jonhard Høgnesen
3-0: Petur Sjúrðarberg

LÍF økir

Eftir stegðin helt LÍF á, har teir sleptu. Leirvíkingar skaptu nógv fleiri málmøguleikar, meðan ÍF als ikki kundi liva upp til tey átta málini,

Hvørgin parturin vildi tapa

Tað er framvegis púra opið, um tað skulu vera toftamenn ella teir í Runavík, sum skulu í steypafinaluna

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen

Um tað verður B68, ella um tað verður NSÍ, sum skal spæla fótbólt ólavsøkudag, er á ongan hátt avgjørt. Fyrra umfarið í hálvfinaluni ímillum grannafeløgini á Skálafjørðinum endaði málleyst.

Tað var týðuligt, at talan var um grannauppgerð, og tað var týðuligt, at talan var um fyrra dystin av tveimum. Líkindini vóru einki at rópa hurrá fyri. Tað mundi vera ein partur av frágreiðingini til, at spælið ikki var gott, men bara ein partur. Grannauppgerðir eru ofta órudduligar. Henda var einki undantak í so máta. Bólturin var nógv í luftini, og tað vóru nógvar langar sendingar og nógvar sera lítið neyvar sendingar.

Málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir. NSÍ rakti eina ferð í stólpan, og einar tvær ferðir beindi B68 málverjin langskotsroyndum til horna. Anders Nygaard hjá B68 var triggjar ferðir spældur leysur fyri NSÍ málinum, men Jens Martin Knudsen er framvegis ein brandur millum stólparnar, og ikki minst tá talan er um ein ímóti einum støðum er hann stinnur. Tað prógvaði hann tær ferðirnar, sum B68 miðframherjin kom leysur í brotsteigin.

At málmøguleikarnir ikki vóru so nógvir var ein staðfesting av tí veruleikanum, at tað var ikki í hesum dystinum, at avgerðin skuldi fella um, um tað skal verða NSÍ ella B68, sum skal spæla finaluna. Bæði liðini vóru stutt sagt meiri upptikin av ikki at tapa, enn tey vóru av at spæla álopsspæl og harvið til upplagdar málmøguleikar.

Tað verður í seinnu hálvfinaluni, at avgerðin skal fella. Nær tann dysturin skal spælast var ikki avgjørt, tá blaðið fór til prentingar, men tað er eingin orsøk at skunda sær so leingi, sum HB og VB ikki hava spælt fyrru hálvfinaluna.

B68 kann kanska metast sum lítil favorittur, tí teir eiga heimavøll. Men NSÍ hevur stórar møguleikar. Um tað eydnast teimum at skora eitt mál, so skal B68 skora tvær ferðir og ikki bara eina ferð. Um tað fer at standa á jøvnum í málum, so verða tað málini, ið eru skorað á útivølli, sum fara at verða avgerandi.

Landsliðsmenn sóu reytt

Tveir av mest eyðsýndu spælarunum í føroyskum fótbólti tey seinastu árini vóru miðdepil fyri tí, sum ikki hevur við fótbóltsspælið at gera. Fróði Benjaminsen hjá B68 varð rikin av vøllinum síðst í 1. hálvleiki, og tíðliga í 2. hálvleiki sá Pól Thorsteinsson hjá NSÍ reytt.

At reyða kortið var tvær ferðir á lofti, og at gula kortið eisini varð víst, kundi boðað frá, at talan var um tætta og ófantaliga grannauppgerð. Soleiðis var tað yvirhøvur ikki. Spælið var á ongan hátt ófantaligt, og taklingarnar vóru ongantíð ljótar.

Spurningurin um linjuna hjá dómaranum verður altíð aktuellur, tá tveir spælarar verða riknir av vøllinum. Ikki minst tá talan er um lítið ófantaliga uppgerð. Okkum er ikki kunnugt, um nakar dómaraeygleiðari var í Runavík. Men undir øllum umstøðum kunnu støðurnar, sum bóru reyðu kortini við sær – tað var ivaleyst fyri at hevna seg – nýtast á fundum og skeiðum fyri dómarum. Eitt eru reglurnar, og eitt annað er tulkingin av teimum og kenslan fyri, hvussu tað er neyðugt at stýra og fáa tað at glíða so væl, sum tað á nakran hátt ber til.

Undir øllum umstøðum er tað ein veruleiki, at Fróði Benjaminsen verður ikki á B68 liðnum, tá teir á Svangaskarði annan hvítusunnudag fáa vitjan av EB/Streymi. Pól Thorsteinsson fer ivaleyst at halda hvítusunnu í heimbygdini Vági. Men hann sleppur ikki upp í part, tá NSÍ 2. hvítusunnudag fer at spæla ímóti VB.

NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Arnfinn Langgaard, Jónstein Petersen – Ian Højgaard, Helgi L. Petersen, Sjúrður Jacobsen, Gert Langgaard – Óli Hansen, Sonni L. Petersen

B68: Mikhal ??? – Jan Petersen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira, John Heri Dam – Jann Ingi Petersen, Oleif Joensen, Fróði Benjaminsen – Arnold Joensen, Anders Nygaard, Øssur Hansen

Helgi L. Petersen og hinir í NSÍ máttu taka til takkar við einum mállesyum javnleiki móti B68 í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini. Tveir landsliðsleikarar, Fróði Benjaminsen hjá B68 og Pól Thorsteinsson hjá NSÍ, vórðu riknir av vøllinum og hava leikbann til næsta landskappingardyst
Mynd: Álvur Haraldsen

VB – EB/Streymur 2-0 (1-0)

Vágbingar í hálvfinaluna

VB spældi seg sunnudagin í hálvfinaluna í steypakappingini. EB/Streymur megnaði ikki at gera nakað við heimaliðið, sum hevði yvirvág í spæli og fleiri málmøguleikar

Marni Djurhuus hjá EB/Streymi hevur bóltin, meðan Jón Pauli Olsen roynir at fáa fatur á honum. Aftanfyri standa Ronnie Samuelsen og Tórur Holm
Mynd: Dagfinn Olsen

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

VB skal møta HB í hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið. Hetta gjørdist greitt, tá vágbingar vunnu 2-0 á EB/Streymi í Vági sunnudagin.

Ikki meira enn ein minuttur var leiktur, tá dómarin dømdi brotsspark til VB. Robert Cieslewicz varð feldur uttalaga í brotsteiginum, meðan hann vendi ryggin til málið. Brotssparkið var sera óneyðugt, tí VB-framherjin stóð ikki í eini vandamiklari støðu júst tá.

Pólverjin skeyt brotssparkið sjálvur, men Gunnar á Steig bjargaði. Bólturin datt tó útaftur til Robert, og hesuferð sendi hann framvið málverjanum og í netið.

Bert ein minuttur var á urinum, og VB hevði longu lagt seg framum. Nógvur vindur var í Vági henda dagin, og EB/Streymur hevði undanvind fyri steðgin. Hesum dugdu teir tó ikki at gera sær dælt av, og VB hevði bóltin meira.

EB/Streymur hótti onkuntíð í skjótálopum, men einki spurdist burturúr teimum hálvmøguleikum, sum útiliðið skapti. Álopið hjá EB/Streymi fekk ikki serliga nógv burturúr, og VB var vandamiklari.

Palli økir

Í seinna hálvleiki var tað VB, sum hevði undanvind, og hetta hevði við sær, at bólturin fyri tað mesta var á hálvuni hjá EB/Streymi.

Tíggju minuttir inn í seinna hálvleik fær VB tað seinna málið. Eitt innlegg verður sent innfyri úr vinstru síðu. Bólturin sleppur at ferðast millum vinir á figgindar tvørtur ígjøgnum brotsteigin, har Palli Augustinussen er staddur. Hann langar til, og Gunnar hevur ongan møguleika at bjarga.Verjan hjá útiliðinum stóð heldur still í hesum málinum.

EB/Streymur hótti sjáldan málið hjá VB eftir steðgin, og heimaliðið hevði so gott sum fult tamarhald á dystinum.

Beint eftir málið til 2-0 framdi venjarin hjá VB tvær útskiftingar, sum høvdu til endamáls at spara leikarar. Hann tók Robert Cieslewicz og Jón Gærdbo út, og inn á vøllin komu Birgir Jørgensen og Tórur Holm.

Predrag Zivkovic sat á beinkinum allan dystin vegna skaða í knænum, og Jón Pauli Olsen varð eisini spardur. Hann fekk nakrar fáar minuttir á vøllinum, tá hann kom inn fyri Gisla Sveinbjørnsson.

VB – EB/Streymur 2-0 (1-0)
1-0: Robert Cieslewicz
2-0: Palli Augustinussen

VB: Bjarni Johansen – Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen, Michael í Lágabø – Gisli Sveinbjørnsson, Palli Augustinussen, Slobodan Madzar, Jón Gærdbo, Mortan úr Hørg – Robert Cieslewicz, Nenad Zivanovic

EB/Streymur: Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Knút Vesturtún, Kristian Carlsson, Alfred Joensen – Marni Djurhuus, Jákup Martin Joensen, Ronnie Samuelsen – Andrzej Pacek, Sorin Anghel, Hans Pauli Samuelsen

VB var sterkari í dystinum móti EB/Streymi. Heimaliðið skapti fleiri málmøguleikar og skal nú møta HB í hálvfinaluni
Mynd: Dagfinn Olsen

Kvinnur: HB – KÍ 9-1 (5-1)

Einvegis ferðsla

Kvinnurnar hjá KÍ góvu HB ein veruligan avsmurning í landskappingardystinum millum liðini sunnudagin. 9-1 var úrslitið, og sigurin kundi lættliga verið uppaftur størri

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

KÍ hevur verið einaráðandi innan kvinnufótbólt í nøkur ár, og sunnudagin var tað framsýningarfótbóltur á skránni í Gundadali. HB mátti á heimavølli leggja ryggin til eitt sera eyðmýkjandi stórtap. 9-1 til gestirnar úr Klaksvík, sum nú kanska fingu hevnd fyri ósigurin í steypakappingini í fjør.

KÍ setti seg á dystin frá fyrsta bríksli, og ikki gekk long tíð, áðrenn kvinnurnar úr Klaksvík høvdu skorað trý mál. Síðani minkaði HB um munin til 3-1. Tá hálvleikssteðgurin var, hevði KÍ økt til 5-1.

Útiliðið slapp at spæla, sum tað vildi, og tí lá væl fyri hjá teimum skjótu KÍ-kvinnunum at skora fleiri mál. Eftir steðgin var trýstið á HB málið enn størri, og KÍ fekk eisini fýra mál burturúr. HB spældi við flatari verju, og tað gjørdi KÍ sær dælt av.

HB var ógvuliga sjáldan á hálvuni hjá KÍ, sum hevði ovmikið av málmøguleikum. Í veruleikanum kundi KÍ skora nógv fleiri mál, enn tær gjørdu, og tær raktu stengurnar og tvørstongina fleiri ferðir. Harumframt brendu tær eina rúgvu av møguleikum, tá tær vóru leysar við málverjanum.

KÍ vann stórt hetta vikuskiftið, men liðið hevur framvegis ongan venjara. Higartil hava tær skipa fyri taktikki og útskiftingum sjálvar, og tað hevur gingið væl, men spurningurin er, hvussu leingi liðið kann halda á uttan venjara.

HB – KÍ 1-9 (1-5)
Málskjúttar:
KÍ: Viviann Bjartalíð 3, Rannvá Andreasen 2, Malena Josephsen 2, Elsa Maria Sivertsen 1, Mariann Joensen 1,
HB: Gunn Müller 1

Fleiri avlýsingar

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

Mánadagin skuldi kappingarnevndin hjá FSF gera av, nær dystirnir, sum eru avlýstir, skulu leikast. FSF hevur ikki megnað at halda kappingarskipanina í steypakappingini og í 2. og 3. deild vegna verkfallið.

FSF skuldi áseta nýggjar leikdagar til dystirnar í hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið millum HB og VB, og samstundis verða leikdagar ásettir til dystirnar í 2. og 3. deild, sum ikki hava verið leiktir vegna verkfallið.

Hetta vikuskiftið skuldi Sumba spæla í Havn móti B36, og VB skuldi vestur í Vágarnar, men hesir dystirnir í 2. deild vóru av ongum vegna verkfall. Hjá kvinnunum skuldi liðið hjá B36 suður til Vágs, men hesin dysturin er eisini útsettur.

Verkfallið er komið ógvuliga dátt við hjá FSF og feløgunum. Vónandi fæst ein endi á hesum skjótt.